UTTAN ÚR HEIMI

## Framgongd í Billund

108.368 fólk ferðaðust um flogvøllin í Billund í november, og sjálvt um talan var um eina lítla afturgongd, er leiðslan væl nøgd.

Hon er serliga væl nøgd við, at talið á teimum, sum ferðaðust á rutunum millum Billund og útlond, vaks heili 9,5 prosent, tí so stóran vøkstur kann eingin onnur floghavn í Evropa vísa á, skrivar JydskeVestkysten. Hinvegin minkar ferðafólkatalið millum Billund og Keypmannahavn støðugt. Hjá SAS var minkingin á hesari rutuni 9,3 prosent, men fealgið ætlar kortini at halda fram. Charter-ferðafólkini vóru nakað færri í november enn í november í fjør, men leiðslan í Billund sigur seg hava góðar vónir um nógvar charterferðir næsta ár, tí ferðamannastovurnar hava boðað frá lurfalsliga stórum eftirspurningi.

Ellivu teir fyrstu mánaðarnar av árinum ferðaðust 675.592 fólk á uttanlandsrutunum til og úr Billund. Tað er 11,1 prosent meiri enn somu mánaðir í fjør.

## Kendur múrur hvørvur

Tann heimskendi kinesiski múrurin er nú so illa farin, at bara ein triðingur av honum kann sigast at standa tryggur. Tað skriva kinesiskir fjølmiðlar.

Blaðið Beijing skrivar, at stórir partar av múrinum eru illa farnir, tí fólk hava tikið steinar úr honum til húsabygging og garðar. Hetta er aðru ferð, at kinesararnir fáa at vita, at tann navnframi múrurin er ikki í so góðum standi, sum teir hava hildið. Fyri einum góðum mánað síðani segði tann fyrsti kinesiski rúmdarmaðurin, Yang Liwei, at hann dugdi ikki at fáa eyga á múrin, tá hann fleyg runt um Jørðina. Kinesarar hava annars hildið, at tað bar til at síggja múrin uttan úr rúmdini.

Kinesiski múrurin er umleið 2000 ára gamal og er roknaður sum eitt av teimum mest hóttu bygningsverkunum í heiminum.

## Einki barsilsfarloyvi

Norski krúnprinsurin, Haakon, verður virkandi kongur í Noregi til umleið 1. mars, tí Haraldur kongur skal skurðviðgerast fyri krabbamein í bløðruni.

Nú er tað so, at kona krúnprinsin, krúnprinsessan Mette-Marit, er við barn og skal eiga tann 22. januar, og tí hevði krúnprinsurin ætlað sær í barsilsfarloyvi, tá konan hevur átt. Men tað gongur ikki, siga norskir statsrættarserfrøðingar. Sambært grundlógini skal kongur hitta stjórnina eina ferð um vikuna, og hesum kann hann bara sleppa undan, um so er, at hann er sjúkur ella burturstaddur.

Eivind Smith, professari, sigur við norska útvarpið, at Haakon krúnprinsur kann ikki fáa farloyvi frá skylduni at hitta stjórnina. So leingi kongurin ella krúnprinsurin er í landinum, hevur hann skyldu at hitta stjórnina eina ferð um vikuna, sigur professarin. Hinvegin kann krúnprinsurin taka sær barsilsfarloyvi frá øðrum skyldum so sum at umboða kongshúsið í ymsum viðurskiftum, sigur hann.

## Keypa ov fá jólatrø

Skógarbøndur í Svøríki kæra seg um, at tað gongur illa at sleppa av við jólatrø í ár, og at fólk hava lítlan hug at gjalda tað, sum eitt vakurt jólatræ kostar.

Svensku skógarbøndurnir klára næstan at metta marknaðin, men eitt sindur verður innflutt úr Danmark. Tað hevur kortini víst seg, at sviar eru ikki so fegnir um tey donsku jólatrøini, og at teir heldur vilja hava tey svensku. Men kortini stendur tað á hjá skógarbøndrunum at sleppa av við trøini í ár, skrivar tíðindastovan TT. Annars vórðu nógvir svenskir skógarbøndur meint raktir av frosti seinasta vetur, og tí eru ikki so nógv jólatrø á marknaðinum í ár sum onnur ár.

Eitt gamalt svenskt orðafelli sigur annars, at jólini eru ikki verulig jól, uttan so at jólatræið er stolið. Um tað er ein av orsøkunum til, at sviar hava so lítlan hug at keypa sær eit jólatræ, verður ikki sagt.

# Málið um Lindh-morðið byrjar 20. januar

**Rættarmálið ímóti manninum, sum er skuldsettur fyri at hava myrt svenska uttanríkisráðharran, Onnu Lindh, byrjar tann 20. januar. Roknað verður við, at viðgerðin fer at taka í mesta lagi seks dagar**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*


*Anna Lindh varð myrd tann 10. september. Í januar kemur tann skuldsetti fyri rættin*
*Mynd: Reuters*

Ein 24 ára gamal maður er skuldsettur fyri at hava myrt Onnu Lindh í einum handilshúsum í Stockholm tann 10. september. Hon doyði á sjúkrahúsinum morgunin eftir.

Krister Petersson, ákæri, sigur við Dagens Nyheter, at ætlanin er at avgreiða málið skjótt. Hann roknar við, at ákæruritið verður orðað liðugt miðskeiðis í januar, og tann 20. kemur málið so fyri í rættinum.

At ákæruvaldið hevur skund nú kemst ikki bara av, at svenskir fjølmiðlar vilja hava málið avgreitt sum skjótast, men tað hevur eisini samband við, at tann serligi trygdarsalurin í býarrættinum í Stockholm skal umvælast í næstum.

Gøran Nilsson, býarrættardómari, sigur við Dagens Nyheter, at málið ímóti tí 24 ára gamla manninum fer at taka í mesta lagi seks dagar. Vanliga plagar tað so at taka eina viku, til sjálvur dómurin verður sagdur, og báðir partar fáa so tríggjar vikur til at umhugsa dómin. Sambært Dagens Nyheter er tað longu nú greitt, at taparin fer at skjóta dómin inn fyri hægri rætt.

Løgreglumenninir, sum hava arbeitt við Lindh-morðinum, eru nú í ferð við at fáa tey teknisku prógvini upp á pláss. Teir halda eisini fram við at avhoyra tann skuldsetta, sum framvegis noktar seg sekan.

# Seks løgreglumenn bukaðu mann í hel

**Meðan seks løgreglumenn bukaðu tann 41 ára gamla mannin, tóku aðrir løgreglumenn hendingina upp á sjónband**

LØGREGLUHARÐSKAPUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Atburðurin hjá teimum seks løgreglumonnunum verður nú kannaður.

Tann ógvusliga hendingin byrjaði tíðliga sunnumorgunin, tá løgreglan kom fram á ein mann, sum lá á einum grasvølli uttan fyri eina matstovu í býnum North Avondali í amerikanska statinum Cincinatti, skrivar blaðið The Cincinatti Enquirer.

Ein sjúkrabilur kom á staðið, men fór avstaðaftur, tí tá var maðurin komin á føtur. Lítla løtu seinni kom ein løgreglubilur á staðið. Maðurin, tann 41 ára gamli svarti Nathaniel Jones, fór yvir ímóti løgreglumonnunum. Ein av løgreglumonnunum bað hann steðga á, men ístaðin royndi maðurin at sláa ein av løgreglumonnunum. So byrjaði bardagin. Fleiri løgreglumenn komu á staðið, og Nathaniel Jones varð sligin fleiri ferðir, áðrenn tað eydnaðist løgreglumonnunum at fáa bilbukt við hann og at leggja hann í hondjørn.

Maðurin var tá so viðtikin, at hann mátti á sjúkrahús, og har doyði hann nakrar tímar seinni.

Nakrir løgreglumenn, sum sótu í einum bili, tóku hendingina upp á sjónband. Sambært The Cincinatti Enquirer hava løgregluovastin og borgarstjórin sæð upptøkuna, men teir halda ikki, at løgreglumenninir gjørdu nakað skeivt. Kortini verður málið nú kannað.

# ítróttur

Nr. 230 • mikudagur • 3. desmber 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tryggur heimasigur á Kambsdali

**Eftir dystirnar hetta vikuskiftið, sær tað út til at kappingin fer at standa ímillum ÍF og Mjølnir**

FLOGBÓLTUR
*Hermann Mortensen*

Toppdysturin hetta vikuskiftið, í meistaradeildini hjá monnum var leygardagin á Kambsdali millum ÍF og SÍ. Undan dystinum lógu liðini á ávíkavist fyrsta og triðja plássi í deildini.

### Týðandi sigur

Fyri ÍF var tað tydningarmikið at vinna, tí mennirnir úr Mjølni eru beint í hølunum á teimum, og hjá sørvingum var kravið ein sigur, um teir ikki skulu missa oddaliðini úr eygsjón.

Dysturin var til tíðir javnur og spennandi, serliga fyrsta og annað sett vóru jøvn. Fyrsta settið vunnu fuglfirðingar 25-20. Tað var eitt sindur javnari í øðrum settið, men aftur her vóru tað fuglfirðingar, ið vóru drúgvastur og vunnu settið 25-23. Triðja settið var ein avgreiðslu-spurningur fyri fuglfirðingar, tað vunnu teir sannførandi 25-14.

Hjá sørvingum kom ósigurin sera illa við, tí teir eru nú fýra stig aftanfyri ÍF, og sum tað sær út í løtuni verður tað sera torført at taka ÍF aftur. Fyri ÍF harafturímóti er tað bert ein spurningur um hvør klárar at fylgja við teimum. Fyribils er tað bara Mjølnir, sum hevur vunnið á ÍF.

### Mjølnir ivaleysir

Hin dysturin í meistaradeildini hjá monnum var millum Fram og Mjølnir. Mjølnir vóru undan dystinum stór favorittar og tað megnaðu teir eisini at liva upp til. Kaksvíksingar vunnu sera sannførandi 3-0. Settúrslitini vóru 25-13 25-15 og 25-17.

Støðan í meistaradeildini hjá monnum eftir dystirnar leygardagin er, at ÍF er á odda við 12 stigum og Mjølnir er nummar tvey við 10 stigum, tó hevur ÍF leikt ein dyst meira enn Mjølnir, meðan SÍ er á triðja plássi við 8 stigum. Tað verður ímillum hesi trý liðini at kappingin skal standa. Hini bæði liðini í meistaradeildini Fram og Fleyr, eru ikki góð nokk til at blanda seg í toppin.



*Fuglfirðingar fingu tað ikki so trupult, sum roknað varð við, tá SÍ kom á vitjan leygardagin*

# TB og Mjølnir draga frá

**Oddaliðini TB og Mjølnir vunnu sínar dystir, og Dráttur er av álvara fari at blanda seg**

FLOGBÓLTUR
*Hermann Mortensen*

Í Hoyvíkshøllini skuldi KÍF royna at halda fast, tá Mjølnir var á vitjan. Kvinnurnar hjá KÍF byrjaðu kappingina sera væl, men seinastu dystirnir hava verið ein long mótbrekka og tær hava tapt allar teir seinastu dystirnir. Kvinnurnar úr Mjølni harafturímóti er vælkoyrandi í løtuni og tær liggja á fyrsta plássi saman við TB.

Dysturin endaði við einum 3-1 sigri til klaksvíkskvinnur. Settmunurin varð 25-21 25-15 18-25 og 25-18. Dysturin var spennandi og bæði liðini stríddist væl, men tað vóru tær úr Mjølni, ið drógu longra stráðið.

Á Kambsdali leiktu ÍF og Dráttur. Hetta er fyrstu ferð at liðini hittast í kappingini í ár. Kvinnurnar úr Drátti vunnu dystin 3-0. Settúrslitini vóru 25-23 25-23 og 25-23. Við sigrinum er Dráttur av álvara fari at blanda seg í oddinum í meistaradeildini hjá kvinnum.

Seinasti dysturin varð leiktur í Gundadalshøllini ímillum Fleyr og TB. Tvørakvinnur fingu lætt spæl og vunnu dystin 3-0. Settúrslitini vóru 25-14 25-13 og 25-15.

Eins og hjá monnunum, er kappingin hjá kvinnunum, bara ímillum tvey lið enn, nevniliga TB og Mjøln tey liggja á odda við 12 stigum hvør. Dráttur liggur á triðja plássi við 8 stigum, men tær hava ein dyst tilgóðar, vinna tær hann so sær tað gott út fyri vágakvinnur.

## Flogbóltsúrslit

**Meistaradeild kvinnur**
KÍF-Mjølnir 1-3 (21-25, 15-25, 25-18, 18-25)
ÍF-Dráttur 0-3 (23-25, 23-25, 23-25)
Fleyr-TB 0-3 (14-25, 13-25, 15-25)

**Meistaradeild menn**
ÍF-SÍ 3-0 (25-20, 25-23, 25-14)
Fram-Mjølnir 0-3 (13-25, 15-25, 17-25)